

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 02 - 2012

# Nýtt lív til danskt oljuævintýr

Í Danmark verður vónað, at tey við nýggjari tøkni kunnu syrgja fyri, at landið verður sjálvbjargið hvat olju viðvíkur nøkur ár framyvir. Tað er rúm tíð gingin síðani danska oljuævintýrið var í hæddini, men tað er avgjørt ikki av enn, hóast metingar hjá Energistyrelsen siga, at framleiðslan av danskari olju hevur toppað. Við nýggjari tøkni vóna tey í Danmark at økja um framleiðsluna, soleiðis at tað eydnast at fáa meiri olju upp úr donsku økjunum enn higartil. 2004 var besta framleiðsluárið hjá donsku oljuvinnuni. Síðani hevur oljuframleiðslan bara minkað, og framrokningar hjá Energistyrelsen siga, at danska oljuframleiðslan í 2015 verður 35 prosent lægri enn oljuframleiðslan í 2010. Tí dúva danir nú upp á, at nýggj tøkni og nýggjar mannagongdir kunnu syrgja fyri, at meiri olja kann vinnast úr einstøku økjunum. Eydnast tað, kunnu danir í stóran mun vera sjálvbjargnir, tá tað kemur til olju í mong ár framyvir. Um vit rokna tøkniligu menningina og nýggju granskingina upp í, fara vit at minka munandi um oljuinnflutningin fram til 2035, sigur Jan Harley Andersen, verkfrøðingur í Energistyrelsen, við epn.dk.